# Bilar

Nr. 75 • hósdagur • 21. apríl 2005 • 79. árg.

**Mitsubishi Grand Pajero Dakar 3,2 Di-D**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Motorurin | 3,2 litur | Eginvekt | 2.100 kg |
| | 4syl. turbodiesel 160 hk | Viðførisrúm | 415 / 1700 litrar |
| 0-100 km/t | 13,8 sek. | Prísur | kr. 550.000,- ( 7-pers.) |
| Oljunýtsla | 9,5 km/l | | kr. 310.400,- (Van) + MVG |
| Dekkstødd | 265/65-17 | Søluumboð | Ivan Johansen Bilar |
| Stødd og vekt | | | Hoyvíksvegur 63 |
| Longd | 480,0 cm | | FO-110 Tórshavn |
| Breidd | 188,0 cm | | Tel. 313666 |
| Hædd | 185,0 cm | | www.ivan.fo |

# Mitsubishi Grand Pajero í Dakar útgávu



*Mitsubishi Grand Pajero 3,2 Di-D í Dakar-útgávuni við stórum krom víðvinkul síðuspeglum og 17" alufelgum*



*Grand Pajero hevur sjálvberandi karossarí við innbygdari chassisrammu eins og flestu persónbilar*

**Mitsubishi Grand Pajero hevur fingið eina "facelift" og fæst nú eisini í eini væl útgjørdari Dakar-útgávu. 3,2 litur turbodiesel motorurin við 160 hk er kvikur og hóskar væl til bilin**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Mitsubishi Pajero er ein kendur og væl umtóktur jeepur, sum hevur verið á marknaðinum í mong ár. Pajero verður nógv brúktur av teimum sum hava serligan flutningstørv sum t.d. koyring á vánaligum vegi, ella tey hava brúk fyri einum bili til at draga ein tungan trailara sum t.d hestatransport.

Í tey 27 árini heimsins torførasta skipaða koyring, "Dakar Rally", hevur verið gjøgnumført, hevur eingin annar framleiðari av bilum, lastbilum ella motorsúkklum vunnið so nógv sum Mitsubishi. Teir hava tilsamans vunnið hesa koyring 10 ferðir, harav fimm tey seinastu árini á rað.

Í hesum sambandi hava Mitsubishi valt at marknaðarføra Grand Pajero í eini Dakar-útgávu, ið er ein væl útgørdur bilur. Bilurin hevur eisini fingið eina "facelift" við ymiskum broytingum sum t.d. nýggjum kølaragittari, stórum víðvinkul síðuspeglum eins og broytingum í kabinuni.

Í Dakar-útgávuni er Mitsubishi Grand Pajero eisini sera væl útgørdur við deilvís leðurkabinu.

Grand Pajero hevur ikki, eins og nógvir jeepar, leysa chassisrammu ið karossaríið er sett omaná, men sjálvberandi karossarí við innbygdari chassisrammu eins og flestu persónbilar. Hetta ger sítt til, at bilurin merkist so lættur at koyra, hóast hann vigar umleið tvey tons.

Umframt trygdarskipanir sum EBD, ELR, SRS, hevur Grand Pajero aðrar innbygdar trygdarskipanir sum t.d. MATC (Mitsubishi Active Traction Control). Talan er um antispinn- og stabilitetskontroll, sum forðar fyri at at hjólini fara at spola á hálum undirlagi, og minkar um vandan fyri at bilurin glíður út, um ferðin er nógv í svingum. Eisini er ein onnur skipan MASC (Mitsubishi Active Stability Control), ið regulerar og tryggjar bremsukraftina í svingum, stabilitet og neutralar koyrieginleikar.

Bilurin hevur automatgir, og motorurin er ein kvikur 4 syl. 3,2 litur turbodiesel við 160 hk. Grand Pajero fæst eisini í styttru útgávuni við 3-hurðum og sum Van.



*Kabinan hevur eisini fingið eina "facelift". Í Dakar-útgávuni er bilurin útgørdur við deilvís leðurkabinu*

## Primera og Laguna



Ætlanin er at Nissan Primera skulu framleiðast á somu verksmiðju sum Renault Laguna. Sparast kunnu upp til 750.000 milliónir krónur við at framleiða bilarnar saman, upplýsir varastjórin hjá Nissan

*Kelda: Motor Magasinet*

## Besta ár hjá Honda



Honda hevði sítt besta ár í Evropa í fjør við eini sølu upp á yvir 250.000 bilar. Hetta var ein vøkstur upp á 17,6 prosent. Civic-serian hjá Honda seldi best

*Kelda: Motor Magasinet*

## Kinesiskir bilar til Evropa



Fyrstu kinesisku bilarnir koma til Evropa í vár. Talan er um kinesiska bilmerkið Jiangling, sum hevur gjørt avtalu við bilainnflytarar í Hálandi og Belgia

*Kelda: Motor Magasinet*